## Danir eftirlit við Íslandi

Síðani amerikanararnir fóru av herstøðini í Keflavík, hava stríðsflogfør hjá ymsum NATO-londum skiftst um at hava eftirlit við íslendska loftrúminum. Fleiri lond hava longu havt uppgávuna, og í løtuni eru tað flogfør hjá danska flogvápninum, sum hava eftirlit við íslendska loftøkinum. Talan er um fýra jagaraflogfør, og tey verða verandi í Íslandi til út í apríl mánað. Ein uppgáva hjá donsku flogførunum er at halda eyga við, at fremmand stríðsflogfør so sum russisk halda seg uttan fyri mark. Meðan teir eru í Íslandi, fara donsku flogskipararnir eisini at hava ymsar venjingar, skrivar Morgunblaðið.



## Sjúkrarøktarfrøðingur stjól tablettir

Kommunan í Vejen í Vesturjyllandi hevur givið einum sjúkrarøktarfrøðingi í heimarøktini sekkin, tí tað er komið fram, at hon hevði stolið 28 sovitablettir frá einari eldri kvinnu í býnum Vejen. Tað vóru starvsfólk í røktarumsitingini, sum avdúkaðu stuldurin, skrivar JydskeVestkysten. Kvinnan bleiv koyrd úr starvinum beinanvegin. Hon er skuldsett fyri stuldur, og ákæruvaldið skal nú taka støðu til, um hon skal fáa bót, ella um málið skal í rættin.

# Brøður á brúnni



*Sverri og Marner Kjærbæk eru sera væl nøgdir við Norrønu*

*Mynd Jan Müller*

**Tað var av tilvild, at brøðurnir Sverri og Marner Kjærbæk úr Vági komu at sigla við Norrønu fyri einum góðum ári síðani, Sverri sum skipari og Marner sum yvirstýrimaður. Báðir høvdu siglt við A. P. Møller - Mærsk frammanundan, Sverri við bingjuskipi og Marner við frálandaskipi. Nú komu teir fyri fyrstu ferð umborð á sama skip sum skipari og yvirstýrimaður á føroyska flaggskipinum**

UMBORÐ Á NORRØNU
*Jan Müller, Rás2*
*Árni Joensen, Sosialurin*

Var tað av tilvild, at teir komu umborð á Norrønu, var tað ikki av tilvild, at brøðurnir gjørdust sjómenn. Tó so, sum ungur hevði Sverri ein dreym um at gerast snikkari, men stutt áðrenn hann var liðugur við framhaldsdeildina, sá hann eina lýsing, har Mærsk søkti eftir aspirantum, og hann valdi at royna. Tað bleiv byrjanin.

Sverri heldur, at tað var hóast halt ikki so løgið, at tað bleiv sjógvurin. Abbin og pápin og brøður hansara høvdu verið sjómenn, so tað lá líkasum í genunum. Marner var ongantíð í iva, og tá so tann eldri beiggin fór tann vegin, var eingin ivi um, at Marner eisini skuldi á sjógvin.

Men hvussu riggar tað, at tveir brøður eru ovastu menn umborð á sama skipi?

– Tað riggar væl. Vit hava góð viðurskifti við hvør annan, bæði professionelt og í frítíðini, so tað er eingin trupulleiki. Harafturat hava vit gott fólk rundan um okkum, sigur Marner.

### Gott skip

Teir báðir eru á einum máli um, at Norrøna er eitt gott skip í allar mátar, og teir eru onga løtu í iva um, at Norrøna er eisini eitt sera trygt skip at sigla við. Sverri hevur siglt mong ár við stórum skipum, men hann heldur, at av teimum skipunum, sum hann hevur siglt við, hevur Norrøna ein tann besta stabilitetin.

-Tað hevur verið nevnt, at Norrøna er og stór til at sigla í Norðuratlantshavinum um veturin. Hvat heldur skiparin?

– Eg vil siga, at vit sigla á einari av teimum ringastu havleiðunum í heiminum, men skipinum bagir einki. Veðrið fáa vit einki gjørt við, so tað má sær ráða, og tað er nú eina ferð so, at viðhvørt standa vit yvir fyri veðri, sum hvørki vit ella nakað annað skip kunnu sigla í, og so mugu vit laga okkum eftir umstøðunum, sigur Sverri.

– Tey, sum hava skil fyri skipum og sigling, vita, at Norrøna er eitt trygt skip - eisini í Norðuratlantshavinum um veturin, men sjálvandi kann veðrið vera so ringt, at tað er skilabest at lata tað fara framvið, áðrenn vit fara, sigur Sverri.

Marner heldur, at onkuntíð kann tað tykjast eitt sindur ógvusligt, tá Norrøna er komin til Hanstholm, men yvirmenninir taka eingi óráð fyri, so er ikki farandi inn, verður farið aðrastaðni. Og er ivaveður, er ein so mikið meiri varin, leggur hann afturat.

### Oyrareingir og Esbjerg

Um ikki so langa tíð verður bingjuhavnin á Oyrareingjum liðug, og tá fær Norrøna eina alternativa havn at hava til at taka, um skipið